STUDNI
Student Grant Fund

# Vegleiðing til stuðulsskipanina
# **Málslig fyrireikingarskeið**

Henda skipanin veitir stuðul til málslig fyrireikingarskeið til hægri útbúgvingar í ikki enskt-talandi londum, tó ikki til danskt, norskt og svenskt, og er ætlað teimum, ið hava ætlanir um at lesa hægri lestur í hesum londum. Gjørt verður vart við, at málskeiðini skulu vera á høvuðsmálinum ella á einum av høvuðsmálunum í landinum, tó ikki á enskum. Hægri lesturin kann lutvíst ella heilt fara fram á enskum í tí ikki enskt-talandi landinum.

**Krøv til málsligu fyrireikingarskeiðini:**

- Skeiðini skulu vera málsliga førleikagevandi til hægri lestur. Hetta merkir, at luttøkan á skeiðnum ella tann endaliga próvtøkan á skeiðnum er á einum tílíkum støði, at tann lesandi nær tann málsliga førleikan, ið skal til fyri at lesa á hægri lærustovni. Skjalprógv, fyri at so er, má leggjast við umsóknini.
- Skeiðini skulu vera fulltíðarskeið við í minsta lagi 15 tímum um vikuna.
- Skeiðini skulu eisini góðkennast av Studna.

**Á hvønn hátt verður stuðulin veittur og hvussu leingi?**

Stuðulin verður í fyrstu atløgu veittur sum lán til skúlagjald og lán til livikostnað eftir fylgjandi reglum:

- Til skúlagjaldið verður veitt lán, tó vanliga í mesta lagi kr. 20.000. Skúlagjaldið umfatar bert útreiðslur, ið hava beinleiðis við lesturin at gera.
- Til livikostnað verður veitt lán. Lánsupphæddin, ið verður veitt hvønn mánað, er mánaðarliga studningsupphæddin, sum til eina og hvørja tíð verður veitt til hægri lestur í Føroyum – skúlaárið 2017/2018 er henda upphædd kr. 4.315.
- Stuðulin verður í mesta lagi veittur í 6 mánaðir.
- Er talan um heilt fremmant mál, kann stuðul veitast í upp til 1 ár.

**Í hvørjum førum og hvussu verða lánini umløgd til studning?**

Um tann lesandi, innan 15 mánaðir eftir at málsliga fyrireikingarskeiðið er endað, fer undir hægri lestur í einum landi, har høvuðsmálið er tað sama, sum tað var á málsliga fyrireikingarskeiðnum, verða lánini umløgd til studning. Umleggingin verður framd, eftir at tann lesandi hevur tikið próvtøkurnar á fyrsta lestrarári í útbúgvingini.

**Umsóknarmannagongd:**

- Nær skal søkjast? Søkjast skal helst, áðrenn farið verður á málsliga fyrireikingarskeiðið. Umsóknarfreistin er tó fyrst úti, tá skeiðið endar.
- Umsóknarblaðið ”Umsóknarblað til málsligt fyrireikingarskeið”, ið fæst á heimasíðuni www.studni.fo, verður saman við skjalprógvum sent Studna (sí tvey tey fyrstu punktini í „Krøv til málsligu fyrireikingarskeiðini“)
- Um umsóknin verður játtað, fært tú saman við játtanarskrivinum eitt skuldarbræv við eini upphædd, sum svarar til kostnaðin, ið Studni veitir í láni til skúlagjaldið og láni til livikostnað. Tað er henda upphædd, ið seinni kann verða umløgd til studning.
- Í fyrsta umfari rindar tann lesandi skúlagjaldið.
- Skúlagjaldsparturin verður útgoldin, tá skuldarbrævið og kvittanin fyri at skúlagjaldið er goldið, eru Studna í hendi.
- Livikostnaðarparturin verður útgoldin mánaðarliga.